# Ellisakfør til Vestmanna

Føroya Ellisakfør skipar fyri einum túri til Vestmanna sunnudagin 18. mai. Møtt verður á Fjørðukrónni í Vestmanna kl. 14, har felagið bjóðar til kaffi og ábit. Síðan verður skipað fyri rundvísing av øllum virkseminum hjá elfelagnum SEV í Vestmanna, bæði í bygdini og í fjøllunum. Tað verður Hjalmar Norðberg Poulsen frá SEV, sum kemur at standa fyri hesi rundvísing. Eirikur Ó. Simonsen, formaður í Føroya Ellisakførum, vónar, at so nógvir limir sum møguligt vera við til tiltakið sunnudagin.



# Jam Session í Tórskjallaranum

Havnar Jazzfelag fer nú regluliga, at skipa fyri „Folk Session“ tiltøkum í Tórskjallaranum hvørt sunnukvøld. Fyrsta tiltakið verður komandi sunnukvøldið, har Guðrið Hansdóttir við orkestur leggur fyri. Síðan verður frítt spælimannasamanspæl, har ein og hvør er vælkomin, at taka ljóðføri í hond. Guðrið Hansdóttir Band endar kvøldið. Tiltøkini byrja klokkan 19.

# Prísfall gav Ågot minni úrtøku

**- Tá vit gjørdu av at leggja um frá línuveiði til garnaveiði, var prísurin á svartkalva omanfyri 30 krónur fyri kilo. Stutt eftir var hann helvtina minni. Kortini hava vit einki mist við at leggja um, sigur reiðarin á Ågot, Eyðstein Poulsen**

FISKIVINNA

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Línuskipið Ågot í Klaksvík hevur verið nakrar túrar á garnaveiði, har teir hava fiskað svartkalva.

- Vit hava verið einar 6-7 túrar, og eg vil siga, at hetta hevur ikki loyst seg verri enn línuveiðan, hóast stórt prísfall hevur verið á svartkalva, sigur Eyðstein Poulsen, reiðari.

Ågot hevur nevniliga bæði línu-og garnaloyvi, og tí hava teir, sum eiga og reka skipið, møguleikan at velja, hvør veiðan er.

### Stórt prísfall

Reiðarin sigur, at tá teir seint í vár gjørdu av at leggja um frá línu til gørn, var prísurin á svartkalva omanfyri 30 krónur fyri kilo – og onkuntíð var hann heilt uppi á 32 krónum fyri kilo.

- Meðan vit riggaðu til, fór prísurin niður á 26 krónur fyri kilo, og tá vit landaðu eftir at hava verið fyrsta túrin, fingu vit í miðal 21 krónur fyri kilo.

Eyðstein vísir á, at prísfallið var størri enn hetta, tí teir næstu túrarnar fór prísurin heilt niður í 15 krónur fyri kilo – og var soleiðis bert ein helvt av tí, hann var, tá teir tóku avgerðina at leggja um.

- Nú er prísurin so farin uppaftur, og miðalprísurin á seinasta túri var stívliga 25 kónur fyri kilo, harav dýrasti fiskurin fór fyri 27 krónur fyri kilo, sigur reiðarin.



*Ågot hevur verið einar 6-7 túrar á garnaveiði, og hóast stórt prísfall hevur verið á svartkalva, hava skip og manning gjørt tað hampiliga gott*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Óheppið prísfall

Eyðstein Poulsen sigur, at hevði prísurin á svartkalva havt hildið sær á tí støði, hann var, tá teir gjørdu av at leggja um, hevði hendan tíðin, sum Ågot hevur verið á svartkalvaveiði við gørnum, havt eydnast rættiliga væl.

- Stundum hevur fiskiskapurin verið heilt góður, men nú prísirnir eru farnir upp aftur á líkinda støði, er fiskiskapurin vorðin lakari.

Reiðarin ásannar, at hetta eru treytirnar í vinnuni.

- Viðhvørt gongur væl, og aðrar tíðir gongur minni væl.

Eyðstein Poulsen sigur, at Ågot ætlandi loysir aftur sunnudagin, og hann væntar, at skipið verður á garnaveiði eina tíð aftrat, áðrenn lagt verður um aftur til línuveiði.

**FAKTA**

| | |
|---|---|
| **Fyrrv. nøvn:** | Urvåg/Noreg |
| **Skipaslag:** | Línuskip/ garnaskip |
| **Smíðistaður/ár:** | Noreg/ 1970 |
| **Longd:** | 37,08 m |
| **Breidd:** | 7,47 m |
| **Maskina:** | Wichmann/600 hk |
| **Eigari:** | Sp/f Ågot |

# Rákið á landgrunninum er skiftandi

**- Vit eru bert viðspælarar í náttúruni. Tá rákið broytist, soleiðis sum vit hava staðfest, broytist so nógv annað í havinum eisini, sigur Eyðstein Poulsen, skipari**

HAVUMHVØRVI

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tá brøðurnir í Klaksvík, Eyðstein, Hjaltur og Pól Eyðfinn, sáli, keyptu Ågot í 1993, vóru teir eisini á garnaveiði við skipinum.

Eyðstein Poulsen, sum vit tosa við í greinini omanfyri, er onga løtu í iva um, at rákið á føroyska landgrunninum kann vera skiftandi – ár undan ári.



*Einaferð helt ein gamal maður fyri, sum var sín seinasta túr á floti, at "tað rekur ikki nú sum áður". Kanska var okkurt um hetta*

- Tá vit í nítiárunum vóru á garnaveiði, sóu vit mangan, at tað rak so hart, at ilt var at finna boyurnar aftur, tá gørnini skuldu dragast. Á fleiri túrum lógu vit og bíðaðu, til boyurnar komu undan kavi aftur.

Eyðstein sigur, at hendan trupulleikan hava teir ikki havt síðan seinast í nítiárunum.

- Men nú er aftur vent, og rákið kann saktans taka boyurnar niður við sær.

Reiðarin heldur tað vera undarligt, at rákið kring Føroyar kann vera so skiftandi.

Hann vísir eitt nú á, at inni á landgrunninum er eitt rák, og á Íslandsrygginum eitt annað rák.

- Norðanfyri síggja vit, at tað bara rekur vestur – og ikki eystur, leggur hann aftrat.

Eyðstein sigur, at menn í fleiri ár hava havt á munni, at rákið í kantinum av landgrunninum var dottið burtur.

- Men nú er líkt til, at havumhvørvið aftur líkist tí, sum var fram til seinast í nítiárunum. Nú mugu menn, sum eru á garnaveiði, aftur leita eftir boyum, og hetta hava teir ikki sæð nógv til í fleiri ár.

Eyðstein Poulsen vísir á, at tá rákið broytist, broytist so nógv annað í havinum eisini, og fiskasløgini ferðast ikki um somu leiðir sum áður.

- Náttúran hevur síni loyndarmál, og í henni eru vit bert viðspælarar, sigur reiðarin.